# Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá
kæra kona mín, góða mamma,
vermamma og omma okkara

**Apolonia Kjølbro**
**(f. Joensen)**
**Klaksvík**

lá sjúk, doyði og fór til gravar.

Takk fyri vitjanir, heilsanir, gávur, blómur og kransar.
Takk fyri gávur til Føroya Felag móti Krabbameini.
Takk til Niels Paula Danielsen, prest
og kirkjutænararnar.
Ein serlig tøkk til Klaksvíkar Sjúkrahús, starvsfólkið
á deild A og starvsfelagar hennara í køkinum.
Takk øll tit, ið fylgdu henni til hennara seinasta
hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

*Kærar heilsanir*

**Finn, Turið, Hanus, Eyðun, Øssur og Ólavur**

# Egon Falk við í filmi í DR1 og DR2



*Egon Falk*

NÝTT ÚR AFRIKA
*Fríðtór Debes*

Donsku hjúnini, Egon og Hanna Falk, ið eru kend her í Føroyum og sum hava sítt dagliga yrki í Tanzania í Afrika – eru við í filmi, sum danskur journalistur hevur gjørt um tey og teirra arbeiði.

Filmurin verður sýndur í sendirøðini Trúgv – Yvirtrúgv og verður sent leygardagin 8. mars kl 18 í DR2 og leygardagin 15. mars kl 17.10 í DR1.

Hetta sigur DR um sendingina:

Í Skandinavia er hann næstan ókendur, men í Tanzania er hann kendur av milliónum av fólkum sum trúboðarin, ið rekur út illar andar og skapar miraklir.

»Kalli meg bara fanatiskan, men tað er tað, ið eg trúgvi uppá«, sigur danski evangelisturin, Egon Falk, um trúgv sína á Gud.

Sendingin er ein mynd av tí karismatiska Egon Falk, sum hevur ferðast um í Tanzania í meira enn 20 ár. Afrikanarar í túsunda tali koma til møtini hjá honum, sum í sær sjálvum eru eitt sersýn: Ein 120 m2 stórur pallur við hátalarum sum til eitt rockshow – har andaútrekan og mirakul verða brúkt sum prógframførsla fyri at Gud eksisterar.

Sendirøðin Trúgv – Yvirtrúgv setir eisini spurningin: Hvat hendir tá man meinar, at man hevur funnið tann endaliga sannleikan? Hvat hendir av avmarkingum og møguleikum? Hvussu langt skal man í heila tikið fara fyri at útbreiða trúgv sína? So langt DR.

Annars er at siga um Egon Falk og hansara virki, at hann fleiri ferðir hevur verið í Føroyum og havt møtir. Tá Egon er í Afrika er tað ikki óvanligt, at hann samlar upp til 100.000 fólk bert á einum møti. Tá hann er liðugur at prædika, so biður hann fyri fólki og nógv verða grødd fyri sjúkur og nógv verða sett í frælsi frá illum andum.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæra mamma, vermamma omma og systir okkara

**Olga Hansen**
**Sørvágur**

andaðist og fór til gravar.

Vit takka tykkum, sum vitjaðu hana so trúliga,
meðan hon lá sjúk.
Ein tøkk til tykkum á B6 og B7 fyri tykkara umsorgan
fyri henni og okkum.
Ein serlig tøkk til prestarnar Berg Debes Joensen
og David Johannesen fyri troystarrík orð.
Vit takka berarum, sangarum og gravarum
og øllum tykkum, sum gjørdu tykkara til, at vit
kundu savnast í heiminum eftir jarðarferðina.
Tøkk fyri heilsanir, blómur og gávur til kirkjuna.
Vit takka øllum tykkum, sum fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Erland, Sjúrður og Eybritt**






# Erland skal verja 21. mars

Tá vit herfyri skrivaðu, at Erland Viberg Jonesen skuldi verja eina Phd ritgerð á Fróðskaparsetrinum, kundi tað misskiljast.

Fyri at beina burtur møguligar misskiljingar, so skal hervið sigast, at verjan verður fríggjadagin 21. mars.

# Tøkk

Øllum tykkum sum sýndu samkenslu
tá kæri maður mín

**Niels Christoffer Debes**

doyði og varð jarðaður, takki eg hjartaliga.

Takk fyri hjálpsemi tykkara á Eldrasambýli í Hoyvík
tann tíð hann var har.
Serstaka tøkk til tykkum á Landssjúkrahúsinum,
sum vóru um hann, prestarnar Sverra Steinhólm
og Hera Joensen fyri góðan stuðul og troystarrík orð,
sangarar og berarar.

Tøkk til familju og vinir, sum eru mær ein góður stuðul
í hesi sváru tíð og tøkk til tykkum, sum komu
inn á gólvið og ringdu til mín.
Tøkk fyri blómur og kransar
og minningargávu til Havnar kirkju.

*Familjunnar vegna*

**Birthy**



# Ein leiklistarlig viðurkenning





*Ársins Herðaklapp verður latið fyri triðju ferð. Avdúkað verður grækarismessudag, hvør fær herðaklappið hesaferð*

**Á grækarismessu verður ársins herðaklapp latið onkrum, ið á einhvønn hátt hevur skarað framúr á leilistarliga økinum**

ÁRSINS HERÐAKLAPP
*Eirikur Lindenskov*

Fyri tveinum árum síðani gjørdi Leikpallur Føroyar av at varpa meira ljós á sjónleikin í Føroyum og tað stóra arbeiði, ið liggur aftan fyri hesa listargrein, hvørja ferð leikur kemur á pall. Hetta var gjørt við at geva »ársins herðaklapp« á stovningardegi Leikpalsins, ið er 12. mars. Grækarismessa er eisini dagurin, tá Leikpallur Føroya heldur aðalfund sín.

Herðaklappið er ein pengagáva upp á 6.000 krónur, ið er ætlað sum ískoyti til ferð í útheimin at hyggja eftir sjónleiki. Umframt hetta er tilevnaður lutur ti meira varandi minni.

Fyrimyndin til hendan lut er skortur ella gríma, ið er til skjals á Føryar Fornminnissavni. tað var Jógvan Johannesen, vanliga nevndur Jógvan á Sýnuni, bátasmiður í Oyndarfirðið, ið skorið hevur skortin. Hann er helst gjørdur um aldarmóti 18-1900. Tað er Regin Arge hjá Fa. Niels L. Arge í Havn, sum hevur tilevnað skortin fyri Leikpall Føroya.

Herðaklappið kann verða latið einstaklingi ella felag, sum á einhvønn hátt hevur skarað framúr í farna ári á leiklistarliga økinum. Til at gera av, hvør skal fáa herðaklappið, er sett nevnd við tveimum limur fyri Leikpall Føroya og einum limir fyri Føroyar Blaðmannafelag. Hesi eru: Dánjal Joensen, formaður, Dagny Joensen, skrivari og Karin Kjølbro.

Fyrsta herðaklappið í 2001 varð latið Linu Larsen, áhugaleikara. Í fjør fekk Hans Tórgarð, sjónleikari, Herðaklappið fyri sítt leiklistarliga virksemi. Á grækarismessu kl 17 fáa vit at vita, hvør fær hesa viðurkenning í ár.


Landsfundur Sambandsfloksins 2003
Verður í Fimleikahøllini í Sørvági 28.-29. mars.
Uppskot til viðgerðar á landsfundinum,
skulu verða skrivstovuni í hendi
í seinasta lagi 18. mars
Nærri verður lýst seinni.
Øll sambandsfólk eru vælkomin
Landsnevndin




